– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Serstøk akitektteknað hús á Strondum

Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snøgg og eru heilt serstøk









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serstøk. Húsini standa sera væl fyri við blindan veg. Grannalagið er sera hugnaligt og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

## Húsini

Húsini, sum eru í einari hædd, eru 4 ára gomul, sera spennandi og nakað fyri seg. Einki er spart tá talan er um tilfar og dygd. Frá gongini sleppur tú beinleiðis út í bilhúsið og í hjallin. Húsini hava stóran køk úr besta tilfari, og haðani kemur tú beinleiðis inn í eina stóra stovu við innbygdari peis. Tey eru kødd við timbri og hava steintak. Eisini hava tey ventilatiónsskipan, sentraldustsúgvara, gólvhita í øllum gólvum eins og gosbað og dampkabinu. Húsini standa sera væl og frítt fyri í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og útsyni er sera gott. Dagstovnur, bygdarhús, skúli, sparkivøllur og busssamband er nær við.

## Stílur og snið – inni og úti

Stílurin er nútímans lættur og ljósur. Alt er í einari hædd og ongar gáttir eru. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Grundstykki er stórt, brotflísar eru runt húsin, og tað liggur væl fyri at gera garð / urtagarð.

## Innan

Har er inngongd, gongd, inngongd til bilhús, fýrrúm, bryggers / vaskirúm, baðirúm við dampkabinu, hjúnarrúm við atgongd til baðirúm við gosbaði og dampkabinu, 2 kømur, køkur / borðstova og stova við peis

## Fakta

| | |
|---|---|
| Adressa | Hálsagøta 14, Strondur |
| Bygdiár | 2006 |
| Hæddir | 1 |
| Gólvvídd | 217 m2 |
| Grundøki | 617 m2 |
| Hjallur | Ja |
| Bilhús | Ja |
| Prísuppskot | Hóskandi boð |









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**